# Kjak



Levi Mørk
*býráðslimur*

## Fótbóltsvøllurin hjá FC-Hoyvík til nýggja støðutakan!

Tað er sera umráðandi at fáa tikið eina nýggja støðu til, hvar í nýggi fótbóltsvøllurin hjá FC-Hoyvík skal liggja. Tað er samtykt í byggi- og býarskiparnarnevndini hjá Tórshavnar kommunu í 2010, at vøllurin skal liggja tæt við nýggja Skúlan á Løgmannabreyt. Henda avgerð er eftir mínum tykki skeiv.

Eg meti ikki at hetta er tann rætta avgerð, sum byggi- og býarskipanarnevndin hevur tikið og hóast eg var við til at samtykkja hesa ætlan á sinni, sum partur av nevndini. Men her má eg viðganga, at hetta ikki er tann rætta avgerðin, sum tikin er.

Orsøkin til at eg havi broytt støðu er, at málið burdi verið lýst betur, áðrenn støða varð tikin í byggi og býarskiparnarnevndini á sinni. Eg haldi eisini, at ynskini hjá FC-Hoyvík um hvar vøllurin skal líggja og ynskini hjá teimun sum koma at brúka fótbóltsvøllin í Hoyvík, skal hoyrast. Tað er ikki gjørt í hesum málið. Vit vit eisini at tað búgva uml. 4000 í Hoyvík og tørvurin er stórur fyri hesum fót-bóltsvølli.

Eg føli eisini at henda avgerð varð koyrd ov skjótt ígjøgnum í byggi- og býarskiparnarnevndini. Tí ynski eg nýggja viðgerð av málinum á fyrst komandi samgongufundi.

Tað er umráðandi at fylgja tí demokratisku ynskinum hjá fótbóltsfelagnum FC-Hoyvík og fólki annars í Hoyvík, hvar í fótbóltsvøllurin skal liggja.

Tað sum eg havi skilt á fólki í Hoyvík er, at tey ynskja at fáa staðsetingina av nýggja fótbóltsvøllinum í Hoyvík broytta til at fótbóltsvøllurin skal liggja tætt við nýggju útstykkingina við Myllutjørn. Har 64 nýggj sethús koma at vera í nærmastu framtíð.

Hetta øki er í Dalinum Langa í Hoyvík. Talan er ikki um tann partin av Dalinum Langa sum er eitt D1 øki. (Friðað øki).

Eg fari tí í næstum at leggja málið til nýggja støðutakan hjá samgonguni og við ynski um at fótbóltsvøllurin kemur á fíggjarlógina hjá Tórshavnar kommunu fyri 2012.

---



Zakarias Wang

## Ólógligt danskt kríggj

*Nú er Danmørk enn einaferð farið upp í eitt kríggj uttan at síggja til, at tað hevur fingið loyvi frá okkum til hetta ævintýr.*

Tað er ólógligt fyri Danmørk at fara í kríggj uttan okkara loyvi, tí tann 28. august 1450 skrivaði danska stjórnin undir bjørgvinarsáttmálan, sum sigur, at hvørki av teimum báðum ríkjunum skal fara undir kríggj uttan so at ráðið í hinum ríkinum tekur fult undir við tí og samtykkir tað og vil tað [skal hwerken righe noghet orloff vppa slaa vden medh thet annet righens radz fulburdh oc samtychke oc wilghe].

Í 1627 fóru danir eisini í eitt slíkt ólógligt kríggj. Teir hildu seg hava skyldu til at hjálpa trúarfeløgum sínum í Týsklandi, og fóru avstað í óðum verkum uttan okkara samtykki ella vilja.

Hetta fekk avleiðingar fyri okkum, sum vit kunnu síggja í tingbókini. Tann 6. juli 1629 hava sandoyarprestur, løgmaður og sýslumenninir í Suðuroy og Sandoy skrivað bræv til kong, har teir siga, at tvey turkaskip við fimmhundrað monnum umborð hava verið í Hvalba. Sjórænararnir hava ikki bert tikið neyt og seyð og bátar, men eisini meir enn tretivu konur og børn, og hava dripið seks fólk. Bygdarfólkið noyddist at krógva seg, og kom tí at svølta. Ein danskur maður, sum var saman við sjórænarunum, segði at næsta ár komu teir aftur við ellivu skipum.

Tíbetur kom friður í lag, og eingi skip komu árið eftir. Men hetta dømi vísir, at tað er sera lætt at fara í kríggj, men vansin við øllum kríggjum er, at vit ongantíð vita hvat ið hendir tá tað fyrst er brostið á, tíansheldur hvussu tað fer at enda.

Hetta er orsøkin til, at ein avgerð um at fara í kríggj má vera væl umhugsað.

Nú varð sagt, at ráð Danmarkar hevði slíkan skund, at tað ikki bar til at spyrja okkum og geva okkum tíð til at taka eina avgerð um hvørt vit tóku undir við hesum tiltaki.

Nú kunnu vit bara vóna, at tað fer at ganga okkum betri enn tað gekk forfedrum okkara í Hvalba í 1629, og fyri ikki um at tala dønum sjálvum tá, men trygd fyri hesum hava hvørki vit ella danir.

---

†

Kunngjørt verður, at okkara kæri maður, pápi, verpápi og abbi

**Niels Marius Petersen**
**fyrrverandi bátasmiðjur**
**í Sandavági**

andaðist leygardagin, 91 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Sandavágs kirkju týsdagin kl. 14.00

**Julianna, Petur Elias, Dorthea og Birita**

Tey, ið vilja minnast Niels Marius, kunnu lata eina peningagávu til Meiningheitshúsið í Sandavági.

---

## TØKK

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá kæra kona og mamma, vermamma og omma okkara

**Alma Tauser**

andaðist og varð jarðað.

Ein serstøk tøkk til tykkum á B7 og B6 fyri góða umsorgan og til Bergur Debes Joensen, prest, fyri góð og troystarrík orð á sjúkrahúsinum og í kirkjuni. Somuleiðis tøkk fyri blómur og kransar og fyri gávur til Alzheimersfelagið. Tøkk til tykkum, ið hjálptu til á einhvønn hátt. Tøkk til øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

***Vegna tey avvarðandi***
**Jóhan, Alexandra, Dánjal og Jóhannes**


